# TEY FLOKKAÐUST



Eyðun Klakstein
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Í nógv ár skrivaði Rasmus Seebach tónleik til onnur, men í fjør tók hann umsíðir stigið sum poppsangari sjálvur, og síðani hevur hann havt fleiri hitt, selt eina rúgvu av fløgum og er blivin poppstjørna í Danmark.

Men tað var ein serligur sangur sum gjørdi, at Rasmus Seebach umsíðir – sum 29 ára gamal – fór undir yrkisleiðina sum solistur.

– Eg skrivaði sangin Engel, og eg helt ikki, at eg kundi biðja nakran annan syngja tann sangin, tí hann var so persónligur. Tí gjørdi eg av at syngja sangin sjálvur og geva hann út, segði Rasmus Seebach, tá hann í gjárkvøldið var gestur í sendingini Hvonn Live á Rás2.

– Eg hevði eisini gjørt upp við meg sjálvan, at gekk tað væl við fyrsta sanginum, so skuldu vit geva eina heila fløgu út eisini.

Og soleiðis bleiv tað. Engel gjørdist eitt risahitt, og síðani hevu Seebach hittað við sangum sum Glad Igen, Den Jeg Er og seinast Lidt I Fem.

## Beinini á jørðini

Eftir ongari tíð var Rasmus Seebach farin frá at verða tann rímiliga ókendi framleiðarin og sangskrivarin til at verða eitt tað kendasta poppnavnið í Danmark.

– Eg veit ikki, um eg skal siga, at eg var tikin á bóli av hesum, men eg hevði ikki roknað við at selt so nógvar fløgur, sum eg havi gjørt, sigur Rasmus Seebach.

– Hetta hevur verið ein stór broyting í mínum lívi, men eg havi roynt ikki at verða tikin av fótum av hesum. Eg vil ikki missa jørðforbindilsi fyri tað, um tað hevur gingið væl við tónleikinum, sigur hann.

Rasmus Seebach hevur eisini nógvar føroyskar fjepparar. Tað sást bæði til tiltøkini, hann framførdi á í Havn leygarkvøldið, og tað sást eisini á Hvonn sunnukvøldið. Tey ungu flokkaðust um Seebach, og eftir framførsluna mundi hann ikki blivið liðugur at skriva autografar til fólk.

– Eg havi verið fantastiska væl móttikin í Føroyum, og vit hava veruliga hugnað okkum her um vikuskiftið, segði Rasmus Seebach.

## Undirhald og kjak

Hvonn Live sunnukvøldið bjóðaði eisini annað undirhald. Robert McBirnie fortaldi nakrar góðar og sang nakrar sangir, og teir báðir Sakaris Joensen og Jústines í Túni spældu tveir av sínum frálíku sangum.

Landsliðsvenjarin í fótbólti, Brian Kerr, legði leiðina fram við, og han presenteraði eisini sín nýggja hjálparvenjara – íran Johnny McDonnell.

Og kjakast var eisini um nýggjar miðlar, og hvussu fjølmiðlarnir kunnu gagnnýta nýggju tøknina. Høgni Rasmussen, stjóri á Sansum, og Búgvi Dalsgarð, ráðgevi á Sendistovuni, søgdu sína hugsan um hetta.

Tað var aftur hesaferð proppað við fólki á Hvonn til live sendingina, sum Rás2 vanliga sendir einaferð um mánaðin av Hvonn.



*Robert McBirnie fortaldi onkrar góðar og sang nakrar sangir*

*eydun@sosialurin.fo*